# Allan aftur á landsliðnum

**Eftir drúgva skaðafráveru hevur KÍ miðvallarin, sum varð roknaður at teljast millum teir bestu í landinum, aftur fingið landsliðsboð**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Allan Joensen úr KÍ verður millum spælararnar, sum hittast fyrrapartin í dag at fyrireika seg til landsdystin ímóti Kasakstan. KÍ spælarin fekk landsliðsboð í fyrradagin, tá ið tað var greitt, at Helgi L. Petersen ikki verður førur fyri at spæla. Helgi varð skaddur í fótliðnum undir venjing í síðstu viku. Hann var ikki førur fyri at spæla ímóti B68 2. páskadag, og nú hevur hann sent avboð til landsdystirnar ímóti Kasakstan.

Allan Joensen, sum er 29 ára gamal, hevur áður spælt sjey ferðir á landsliðnum. Hann var tann 50. spælarin, sum umboðaði Føroyar eftir altjóða limaskapin í 1988. Fyrsti dysturin hjá Allani Joensen var í gjár fyri átta árum síðani. Tá taptu Føroyar á Svangaskarði 4–0 ímóti Finnlandi, og Allan var allar 90 minuttirnar á miðvøllinum, har setningurin hjá honum fyrst og fremst var at hava eyguni við Jari Litmanen.

Sjeyndi og higatil síðsti landsdysturin hjá Allani Joensen var, tá Føroyar 6. oktober í 1996 taptu 8–1 á Svangaskarði ímóti Jugoslavia. Tá var Allan Joensen eisini á miðvøllinum allar 90 minuttirnar.

Tá ið Allan í eitt stórt ár sum 21 og 22 ára gamal spældi sjey ferðir á landsliðnum, so var tað sjálvandi tí, at hann tá varð mettur at vera ein tann evnaríkasti spælarin.

Orsøkin, til at Allan ikki hevur verið á landsliðnum síðani 1996, er tann, at hann hevur verið so skaðaplágaður. Hælsinan slitnaði, og leingi sá tað út til, at Allan ikki skuldi koma fyri seg aftur sum fótbóltsspælari í fremstu røð. Hann treiskaðist fleiri ferðir, men var noyddur at geva upp at aftur. Eftir at hann hevði hildið langan steðg frá fótbóltinum, eydnaðist tað honum í fjør at koma fyri seg aftur, og í ár hevur hann verið álitið á KÍ miðvøllinum.

### Fleiri miðverjar

Hóast hann á KÍ liðnum fyri tað mesta er á miðvøllinum, og hóast hann áður hevur verið á landsliðsmiðvøllinum, so er tað neyvan fyrst og fremst við miðvallarplássi í huga, at landsliðsvenjarin hevur sent boð eftir KÍ spælaranum. Sannlíkið man vera størri fyri, at hann fer at fáa kjans í verjuni, har hann áður bæði hevur verið miðverji og vongverji á landsliðnum.

Óli Johannesen og Jón Rói Jacobsen hava verið fastir miðverjar seinasta árið. Hvørgin teirra er tøkur í dag. Pól Thorsteinsson er tøkur í dag, og tað er Hans Fróði Hansen eisini. Men dystirnir ímóti Kasakstan eru fyrst og fremst fyrireikingar dystir til EM undankappingardystirnar seinni í summar. Tann fyrsti verður í Reykjavík, og tá verða bæði Óli Johannesen og Pól Thorsteinsson leikbannaðir. Teir hava báðir tvey gul kort á kontoini. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað hevur stóran týdning at finna fram til nýggju samansetingina í miðverjuni. Tað er hugsandi, at bæði Hans Fróði Hansen og Allan Joensen fara at fáa møguleikan at vísa sínar dygdir, nú Kasakstan er í Føroyum.

## Landsliðið hjá Kasakstan á føroyaferðini

| leikari | føðingard. | felag | d/m |
|---|---|---|---|
| **Málmenn** | | | |
| Yúri Nóvikov | 19.05.72 | "Ertis" Pavlodár | 9/-7 |
| Aleksandr Mokin | 19.06.81 | "Gjenis" Astaná | 0 |
| **Verjuleikarar** | | | |
| Igor Avdéyev | 10.01.73 | "Gjenis" Astaná | 16/6 |
| Igor Solosjenko | 22.05.79 | "Sjahtör" Qaraghandy | 5 |
| Júri Krótov | 12.05.78 | "Jelimái" Semey | 4 |
| Maksim Sámtjenko | 05.05.79 | "Aqtöbe-Lento" Aqtöbe | 2 |
| Denis Proskúrin | 03.04.79 | "Jelimái" Semey | 0 |
| Denis Stjyótkin | 14.09.82 | "Ekibastúzets" Ekibastuz | 0 |
| **Miðvallaleikarar** | | | |
| Nurmát Mirsabayev | 11.11.72 | "Aqtöbe-Lento" Aqtöbe | 14/1 |
| Nurbol Gjumaskaliýev | 11.05.81 | "Toból" Qostanay | 3 |
| Dmitriy Kistjenko | 29.03.79 | "Ekibastúzets" Ekibastuz | 2 |
| Evghéniy Lóvtjev | 06.08.75 | "Gjenis" Astaná | 1 |
| Daniyár Mukánov | 26.09.76 | "Toból" Qostanay | 1 |
| Konstantin Kánin | 29.05.82 | "Ordabasi" Chymkent | 0 |
| **Álopsleikarar** | | | |
| Evghéniy Lunöv | 26.04.76 | "Gjenis" Astaná | 7/1 |
| Valériy Garkúsja | 14.03.77 | "Toból" Qostanay | 3 |
| Aleksandr Sjátskihh | 21.01.74 | "Gjenis" Astaná | 0 |
| Serghéy Skorihh | 25.05.84 | "Ertis" Pavlodár | 0 |
| Venjari | | | |
| Leonid Pahhómov | 17.02.43 | Russland | |




VIÐMERKINGAR

# Føroya Nýork - Faroe Islands New Energy

### Varandi orkuloysnir til burðardygga framtíð



Føroya Nýorka er felag undir stovnan og hevur sum endamál at veita útbúnað og loysnir til burðardygga orkutilfeingisnýtslu grundað á sólarorku, vindorku, alduorku, biogassi, vetni og øðrum varandi framleiðsluháttum.

Føroya Nýorka kann bjóða fram heimsins mest framkomnu sól-ravmagnstøknina frá Shell Solar (Siemens) og Bekaert, og somuleiðis dygdargóðu sólpanelini frá Batec. Allur útbúnaður er systemgóðkendur til uppstan av góðkendum EL-og HVS-innleggjara.

Vindorka kann fáast frá heilt smáum enskum 2-20 KW skjóttgangandi myllum og upp í fleiri hundrað kilowatt framkomnar danskar ella týskar myllur. Brúktar danskar myllur frá 75 til 150KW í sera góðum standi kunnu útvegast bíligt.

Biogasskipanir til ravmagn, hita og vistfrøðiliga tøðframleiðslu kunnu veitast í fleiri støddum. Burturkast og avlop frá fiskiídnaði, landbúnaði, størri matstovum og øðrum við lívrunnum evni kann alt nýtsast sum rávøra.

Er áhugi at framleiða vetni til brennikyknur kunnu vit veita lidnar loysnir frá 3 til 250 KW. Brennikyknur kunnu samanbyggjast og størri orkunøgd veitast. Er sera væl nýtiligt til sethús, ídnað, og sum neyðagregat ella backupp støð til vinnuvirki og stovnar.

Samstarvsavtalur eru við últendsk virki og ráðgevandi fyritøkur og stovnar og kann øll ráðgeving og vegleiðing fáast til forkanningar, loyvisumsóknir, fíggingarmøguleikar, stovnan av vindorkufelag, uppsetan av útbúnaði o.a.

### Sólorka frá Føroya Nýorku

Sólarljós kann umsetast til bæði ravmagn og heitt vatn. Við ásannan at verandi orkuloysnir ikki koma at standa við í nógv ár afturat, og at hesar annars eru kostnaðarmiklar og dálka náttúru og umhvørvið, verður boðið Tygum at fáa sólkyknur til ravmagn ella sólpanelir til heitt vatn settar upp til sethús ella virki, bátin, seyðahús, svimjihøll, skrivstovu ella annað orkukrevjandi endamál.

Sólkyknuskipan til bátin, frítíðarhús, seyðahús, frítíðarhús o.t. er mestan 12 ella 24 volt lágorkuskipan har ravmagnið verður goymt í akkumulatori. Til sethús, virki o.a. er vanligt og skilagott at nýta veksilrættara soleiðis at ravmagnið uppá 220 volt kann nýtast beinleiðis í verandi kaðalskipan.

Sólpanelir til upphitan av vatni til rúmhita ella brúksvatn eru einfaldar loysnir, ið verða settar til verandi miðstøðuhita. Við hábjálvaðum tanga kann heita vatnið goymast í fleri mánaðir, og stórur partur av vanligu hitarokningini kann sparast burtur.

Sópanelir eru aluminiumrammur við rúti har koparpláta klædd við serstøkum svørtum dúki savnar sólarhitan og leiðir henda yvir í koparrør við vatni. Skipanir fáast bæði til brúksvatn og rúmhita og kunnu setast til verandi oljufýring. Kostnaðir frá uml. 25.000 kr. fyri skipan uppá góðar 4 fermetrar.

Tunn-film sólkyknir fáast í rullum ella sum partur av stál og aluzink- takplátum, longdir frá 3 til12 metur. Platurnar kunnu heftast á alt undirlag við halli niður til 5Ë. Tunn-film sólkyknur eru serstakt nýtiligar til vanligt dagsljós. Kostnaður fyri 25 fermetrar stálplátur, við veksilrættara, kaðalar v.m. er uml. 90.000 kr.

Monokrystall sólkyknir fáast í fleiri støddum frá 6 upp til 110 watt. Grundevnið er silicium lagt í stálgittar millum tvær glasplátur. Monokrystallir geva við solar-ljósi mestu orku í mun til onnur sløg av kyknum. Har frástøða til el-netið er stór, verður akkumulatorur brúktur, men møguleiki er eisini at binda til el-netið og spara nakað í orkurokningini. Við 18 fermetrum fæst uml. 3 Kw um dagin í miðal. Kostnaðir eru frá uml. 6.000 til 150.000 kr. fyri 18 fermetrar, alt íroknað.

Víst kann til heimasíður: www.dansksolenergi.dk og www.batec.dk og annars lýsingina frá Føroya Nýorka.

Eru fyrispurningar kann ringjast á tlf. 311319, fax á 313719 ella teldupost: kariark@post.olivant.fo

## Sólorka frá Føroya Nýorku

- ☐ **Sólkyknur** - monokrystallir
- ☐ **Sólkyknur** - tunn-film
- ☐ **Sólpanel**
- ☐ Til sethús
- ☐ -- virkisbygning
- ☐ -- størri alm. bygning
- ☐ -- bátar, frítíðarendamál

Móttakari rindar fyri porto

Navn:
Gøta:
Bústaður:
Bygd/býur:
Telefon, fax, teldupostadr:
Til Postverkið

**Føroya Nýorka**
**Postboks 1156**
**110 Tórshavn**



**ADAPT**
**ADOPT**
**?**

**Kender du resten?**
Hvis du har/eller har haft et tilhørsforhold til vores klub, så kontakt mig venligst på telefon +45 20 20 47 04 eller via e-mail michael@rothmann.dk

Jeg søger bosiddende på Færøerne, som kan hjælpe mig i mit forsøg med at starte en klub på Færøerne.

Med venlig hilsen
Michael Rothmann
?27 Slagelse, Danmark

## Skrivstovufólk

### Avloysarastarv í 1 ár fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi

Apoteksverkið søkir eftir einum skrivstovufólki til bókhaldið hálva tíð.
Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Bókhaldsdeildin er á Tjaldurs Apoteki í Tórshavn.

Starvið inniber m.a. hesar uppgávur
- Upprætting og viðlíkahald av ognarskrá
- Viðlíkahald av ognarum
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur:
- Skrivstovuútbúgving
- Góðan teldukunnleika
- Góð samstarvsevnir

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Jonnu Djurhuus, telefon 341127.

Umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu í seinasta lagi 7/5-2003 sendast til:

**Tjaldurs Apotek**
Postboks 3010
FO-110 Tórshavn

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Útleiguamboð

**Skal tú brúka amboð í styttri tíð?**
**Hví eiga, tá ið tú kann leiga?**

**Til keyps og leigu:**
- Gravimaskinur
- Trumlur
- Lessimaskinur
- Arbeiðsskúrar
- Luft kompressarar og boriútgerð
- Stillads- og forskallingsútgerð
- Umframt mangt annað!



Sosialurin 311820

**Mentamálaráðið**
*KT-DEPILIN*

# KT-ráðgevi

**Starvið**
Eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv sum KT-ráðgevi er leyst at søkja. Starvið, ið er skipað í KT-deplinum, er eitt hálvtíðarstarv.

Høvuðsuppgávurnar eru m.a. at:

- Umsita og menna teldupost- og stevnuskipanirnar á KT-deplinum við serligum atliti at miðnámsskúlum, vinnuskúlum og hægri skúlum
- Samskipa læraraeftirútbúgving á KT-økinum
- Skipa samarbeiði millum skúlar
- Luttaka í arbeiði depilsins saman við verandi starvsfólkum

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjari hevur:

- Útbúgving og/ella drúgvar royndir á telduøkinum
- Undirvísingarførleika og -royndir á miðnámsskúlaøkinum (studentaskúla, handilsskúla ella líknandi)
- Góð samstarvsevni
- Førleika í at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning og við nógvum samskifti við avvarðandi partar.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða send til:
**KT-depilin**
**Hoyvíksvegi 72**
**Postrúm 3279**
**100 Tórshavn**
*att.: Regin Ellingsgaard*

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 28. apríl 2003.

Starvið verður sett 1. juni 2003 ella eftir avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Regin Ellingsgaard, leiðara á KT-deplinum, telefon 321220, teldupostur *reginel@skulin.fo*

***Mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***KT-depilin*** *er staðsettur undir Mentamálaráðnum og veitir sjálvstøðuga KT-tænastu í skúlaverkinum. Teldupost- og ráðstevnuskipan depilsins er FirstClass. Innanhýsis teldukervið er bygt á Windows 2000.*

Ekspetrisa søkist sum feriuavloysari skjótast gjørligt

Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til

**Skálabúðin**
**Box 178 • Tórshavn**

## Til sølu



Ford Focus Diesel stationcar, 2 1/2 ára gamal, koyrt 48.000 km, til sølu fyri 160.000 kr.

**Tlf. 312559, e.** kl. 17.00

# Fyrstafloks seyðahegn

**50x90cm**
**Yvir og undirtráður 3mm**
**Millumtráður 2,5mm**
**Meskavídd**
**B: 15cm - H: 14cm til H: 22cm**
**Galvanisering 240g/m²**

Klipp & goym

**EINANS 375,-**

Klipp & goym

**Fa. H.J.Michelsen**
Handan Á 6, 100 Tórshavn
tlf. 314414 - 214414

## Starvsfólk til Café-in v/ Streymin

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Café-ina/barrina at arbeiða í skiftivaktum.

Viðkomandi skal vera fyltur 18 ár.

**Café-in v/ Streymin tlf. 422033/223232**